## Hava nú hegnað yvir Árnafirði

Í Árnafirði er nú vetrarfriðað, so seyðurin ikki longur gongur millum húsini. Á heimasíðuni hjá Klaksvíkar Kommunu verður skrivað, at hegningin enn ikki er heilt liðug, men at tað tó eydnaðist at fáa seyðin á bøin til ásettu tíðina. Á myndini eru býargartnarin, Hans Hjalti Skaale, og hjálparmaður hansara, Mourits Jakobsen, í ferð við at stika.



## Lønarútgjaldingarnar minkaðu 4,5%

Fyrstu tíggju mánaðirnar í ár eru føroysku lønarútgjaldingarnar minkaðar við til samans hálvum fimta prosenti. Tað framgongur av seinastu hagtølunum hjá Hagstovuni. Ringast stendur til innan fiski- og byggivinnuna. Fallið í lønarútgjaldingum innan fiski- og ráevnisvinnuna var 14,3%, meðan tað fyri byggivinnuna var 14,2%. Fyri almennar tænastur var talan - sum einasti lønarbólkur - um eina øking upp á 4,9%, meðan privati tænastugeirin hevði eitt fall upp á 4,7% í lønarútgjaldinum. Í alt vórðu goldnar 5.527 mió kr. út í lønum fyrstu 10 mánaðirnar í ár. Hetta eru 263 milliónir krónur færri enn fyrstu 10 mánaðirnar í fjør.



*200 krónur kostar tað at keypa eina geit til eitt húski í Sambia. Hendan kann vera við til at bjarga tilverugrundarlagnum hjá einum húski*

# Ein geit bjargar húskinum

**Skandinaviska Barnamissiónin fer nú undir innsavnan, har gevarin fyri 200 krónur kunnu geva eina geit til eitt húski í Sambia**

HJÁLPARARBEIÐI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sambia bløðir orsakað av AIDS sóttini, og børn í túsundatali eru vorðin faðir- og móðurleys. Nøkur av børnunum eru tó so heppin, at tey kunnu búgva hjá familju, og onnur búgva hjá fosturfamiljum.

Ein geit kann geva upp til seks litrar av mjólk um dagin - so hugtakið "fattigmandsko" er kanska ikki heilt av leið. Mjólkin er føðslurík og styrkir immunverjuna og er hetta av serligum týdningi fyri tey ið eru rakt av HIV/AIDS.

Skandinaviska Barnamissiónin arbeiðir í Mpongwe, ein landslutur upp á 800 ferkilometrar við umleið 100.000 íbúgvum. Samstarvað verður við fýra ymiskar samkomur og við kirkjurnar á staðnum, og verða geitir keyptar, sum síðani verða lætnar fátækum familjum.

Kirkjurnar fáa pening til millum 10-20 geitir hvørja fer.

Kirkjan skal keypa geitir frá fólki í nærumhvørvinum, so tey kunnu fáa positivt tilknýti til tey, ið geitirnar verða keyptar frá.

Kirkjan fær loyvi at býta út helvtina av geitunum til fátæku samkomulimirnar meðan hin helvtin skal býtast út til fólk uttanfyri samkomuna.

Geitir liva í fylgi og trívast ikki einsamallar, og tí verða tvær geitir lætnar hvørjari familju. Eisini verður fyrsta lambið undan geitini keypt, soleiðis at húskið veit, at tað lønar seg at halda geitina, heldur enn at slakta hana til matna alt fyri eitt.

Fólk kunnu stuðla við at biða um oyðublað frá Skandinavisku barnamissiónini. Tá oyðiblaðið er fylt út, skal gjaldast við tilhoyrandi girokorti.

## Vilja fyribyrgja fýrverksskaðum

**Landsfeløgini fyri sløkkiliðsmenn og –leiðarar, skipar nú fyri fyrilestrarrøð um teir vandar, sum eru við fýrverki**

FYRILESTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er nærum á hvørjum árið at óhapp standast av fýrverki, uttan at tað enn hevur verið í tær heilt stóru hendingarnar, har goymslur og størri nøgdir hava gjørt um seg.

Feløgini halda, at tað er umráðandi at upplýsa og fyribyrgja, og hava í hesum sambandi fingið tveir serfrøðingar at hava fyrilestur um evnið.

Talan er um ókeypis fyrilestur, sum verður í Norðurlandahúsinum týskvøldi 17. november kl. 18.00 og 18. november somu tíð, í skúladeplinum í Hovi.

Fyrilestrarhaldarar eru tveir lærarar, sum fáast við leiðaraútbúgving hjá Beredskabsstyrelsen í Danmark

Annar teirra er Martin Sørensen, sum fyri stóran part hevur tilevnað útbúgvingina og gjørt royndi við fýrverki, meðan hin, Per Teglgaard, hevur, sum heild tilevnað leiðsluútbúgving hjá Indsatsleiðarum í donsku skipanini.

Teir koma at leggja dent á, handfaring og tilbúgving av fýrverki og hvussu ein innsatsur verður skipaður í hesum sambandi.

Fundirnir eru almennir og ókeypis.

# Prísfall uttan fyri miðstaðarøkið

**Meðan sethúsaprísirnir í høvuðsstaðnum og størru bygdunum tykjast støðugir, er talan um prísfall í útjaðaranum**

SETHÚSASØLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað skrivar Eik, sum nú hevur gjørt upp prísleguna á sethúsum í triðja ársfjórðingini.

Á heimasíðuni skrivar Eik, at talið av handlum framvegis er avmarkað, men lagt verður afturat, at tekin eru um, at sølan nú aftur fer at vaksa.

Talið av sølum var 36 í 1. ársfjórðingi í ár, 29 handlar í 2. ársfjórðingi og 36 handlar í 3. ársfjórðingi, tilsamans 101 handlar higartil í 2009. Til samanberingar vóru 178 handlar teir fyrstu 3 ársfjórðingarnar í 2008, 217 í 2007 og 206 í 2006.

– Bústaðamarknaðurin er sostatt framhaldandi í einari bíðistøðu, har talið av húsum, ið eru til sølu er sera stórt í mun til talið av framdum handlum. Tí er framvegis sera trupult at siga, hvønn veg prísirnir fara at ganga, sigur Bjarni Olsen, stjóri í Eik, á heimasíðuni.



*Hóast búskaparliga niðurgongd, so tykjas sethúsaprísirnir í miðstaðarøkinum ikki at falla nakað stórvegis*

Príssveiggini í miðstaðarøkinum hava verið rímiliga smá, bæði uppeftir og niðureftir: -6% 4. ársfjórðing í 2008, -2% 1. ársfjórðing 2009, +6% 2. ársfjórðing 2009 og -7% 3. ársfjórðing 2009.

Prísirnir á bygd eru hinvegin falnir hetta seinasta árið, men meðan nýggjasta uppgerðin tykist at vísa, at sethúsprísirnir í størri bygdum eru um at stabilisera seg, so eru prísirnir í smærri bygdum falnir heili 26% 3. ársfjórðing 2009.

– Tað er trupult at gera eina rættvísandi uppgerð av sethúsaprísum, og stóra fallið kemst helst ikki bara av veruligum prísfalli, men eisini av, at talið av smáum, gomlum húsum, sum eru seld í smærri bygdum er størri í 3. ársfjórðingi enn í 2. ársfjórðingi, sigur Bjarni Olsen við heimasíðuna.